# Føroyingur eigur einasta línubátin í Skagen

**Á fyrstu søluni á marknaðinum í Skagen fingu teir í miðal 3 krónur meira fyri kilo av toski, enn trolararnir fingu.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Ein ungur føroyingur, 33 ára gamli Helgi Davidsen, sum er ættaður úr Runavík, eigur einasta línubátin í norðurjútska fiskivinnubýnum, Skagen.

Herfyri keypti hann Hvalnes frá føroyinginum, Óla Nattestad, sum býr í Hirtshals. Skipið er bygt sum trolari í Skagen í 1977.

Helgi og hinir tríggir føroyingarnir, sum eru við honum, eru nú á øðrum túrinum. Teir royna eftir toski. Tá ið toskakvotan er uppi, er ætlanin at fiska onnur fiskasløg, eitt nú hýsu og kalva.

### Seldu væl

Vit hittu konu Helga, Tóru, í telefonini úr Skagen hósdagin.

Hon sigur, at Helgi og hansara menn vóru væl nøgdir við seinasta túr. Teir fiskaðu væl og seldu toskin fyri í miðal 3 krónur meira fyri kilo í Skagen enn trolararnir.

– Tey kenna einki til línufisk her, men vóru ovfarnir av, hvussu góður fiskurin var, sigur Tóra.

Hon hevur skilt á monnum, at línufiskurin helst fer at fáa uppaftur betri prís, tá ið tað fréttist, hvussu góður hesin fiskurin er.

### Siglt síðan hann var 14

Tóra sigur, at Helgi hevur siglt, síðan hann var 14 ára gamal. Seinastu árini, áðrenn hann fór á Skagen Skipperskole, sigldi hann við norskum línubátum. Helgi gjørdist fiskiskipari á jólum, og eftir at útbúgvingin var komin í hús, fór hann aftur umborð á norskan línubát.

Nú hevur hann so keypt Hvalnes og er skipari á egnari skútu.

– Enn eitur línubáturin Hvalnes, tí stundir hava ikki verið til dóp, sigur Tóra.

Hon vísir á, at hópur av skjølum skuldu avgreiðast, men navnið verður broytt, tá ið stundir verða til tess.

Einasti línubáturin í Skagen fer at eita Jóhan Emiel eftir elsta og yngsta soni teirra.

Jóhan er 12 ára gamal; Emiel fyllir 2 í september.

### 13 tilsamans

Sosialurin hevur ikki fingið tað váttað, men sagt verður, at 13 línubátar eru í Danmark tilsamans.

Í Skagen er so bara tann eini, og hann eigur 33 ára gamli føroyingurin, Helgi Davidsen, ið hevur staðið á skipsdekki, síðan hann var 14 ára gamal.

# Trý fullsett flogfør til »kærleiksoynna«

**Stórur áhugi er fyri beinleiðis ferðum úr Føroyum til hvítu sólstrendurnar sunnanfyri.**

FERÐING
*Vilmund Jacobsen*



*Í seinnu helvt av nítiárunum kom útferðarlongsul aftur á føroyingar, tí fíggjarligu vánirnar gjørdust betur aftur.*
*Í trý fylgjandi ár hevur Flogfelag Føroya skipað fyri beinleiðis ferðum til Spaniu; í summar er ferðamálið Mallorka, og tað halda fólk ikki vera minni spennandi*
*Savnsmynd*

Í nøkur ár herfyri skipaði eingin fyri charter-ferðum beinleiðis úr Føroyum og suðureftir, og hóast tíðirnar í Føroyum vóru vánaligar í fyrru helvt av nítiárunum, mundi tó vera onkur, sum saknaði sólferðirnar hesi árini.

Kreppuárini hevði vanligi føroyingurin ikki ráð at ferðast, og tí hevði tað neyvan heldur loyst seg hjá føroysku ferðaskrivstovunum at skipað fyri beinleiðis ferðum suðureftir, eins og gjørt hevði verið nøkur ár frammanundan. Men sum nítiárini gingu, og tíðirnar gjørdust betur, sá Flogfelag Føroya, at nú vóru aftur møguleikar at taka hesar ferðir uppaftur.

Og beinanvegin beit á; útferðarlongsul var aftur komin á føroyingar, og nú hildu fólk seg hava ráð at ferðast aftur.

### Trý ár í Salou

Trý summar á rað hevur Flogfelag Føroya skipað fyri beinleiðis ferðum niður til Salou í Spaniu, og trý flogfør hjá Atlantsflogi eru farin fullsett avstað hvørt summar. Allar hesar ferðir eru gjørdar til Salou, sum liggur nakað sunnanfyri Barcelona, har flogfarið lendir. Síðan verður farið í bussi víðari til eitt nú La Penida, sum liggur norðast, Salou í miðjuni og Cambrills, sum er syðsta plássið av hesum.

Onkur helt, tað vera undarligt, at Flogfelag Føroya ikki fleyg til fleiri støð í Spaniu ella aðrastaðni hesi árini, men líkamikið; flogførini vóru fullsett hvørja ferð, og tey mundu ikki vera so fá, sum vitjaðu Salou meira enn ta einu ferðina hesi árini.

### »Kærleiksoyggin«

Í summar er so ferðamálið broytt. Nú verða tríggjar ferðir gjørdar til Mallorka ella »kærleiksoynna«, sum hon vanliga verður rópt í faldarum.

Mallorka er ein av kendastu frítíðaroyggjum, og vanliga eru ferðirnar til oynna eitt sindur dýrari enn tær, sum eru minni kendar. Lítil munur er tó á hesi ferðini, sum Flogfelag Føroya ger og hinum, sum felagið hevur gjørt árini frammanundan.

Tríggjar fráferðir verða úr Føroyum til Mallorka í summar; tann fyrsta verður 6. juli. Síðan verður farið úr Føroyum við 14 daga millumbili, til seinasta ferðin hevur verið í august.

### Bíðilisti

Uni Danielsen á Flogfelag Føroya sigur, at allir ferðaseðlarnir til Mallorka-ferðirnar eru langt síðan seldir og ikki so fá fólk standa á bíðilista, um onkrum skuldi borist frá at farið.

Hann sigur, at flogið verður úr Føroyum til Palma, størsta bý á Mallorka, og møguliga verður millumlent í Skotlandi, sum Atlantic Airways plagar at gera á so longum ferðum.

Í Spaniu hevði Flogfelag Føroya fólk á staðnum at hjálpa sær, og soleiðis verður eisini, nú farið verður til Mallorka.

– Aftrat hesum eru fólk hjá okkum við á øllum hesum ferðunum, sigur Uni Danielsen.



*Løgreglan í Eysturoy hevur saman við løgregluni í Havn og bilsýnismonnum hjá Bileftirliti Føroya kannað 442 bilar í Eysturoynni*

# 165 av 442 bilførarum framdu lógarbrot

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*

Løgreglan í Eysturoy hevur saman við løgregluni í Havn gjørt ferðslukanningar ymsastaðni í Eysturoynni. Hetta vóru tær sokallaðu grein 13 kanningarnar, sum løgreglan hevur ymsastaðni kring landið. Í hesum førinum vóru eisini bilsýnismenn, sum starvast hjá Bileftirliti Føroya, til hjálpar hjá løgregluni. Teir hjálptu serliga til at kanna lastbilar og tunga ferðslu.

Sýslumaðurin í Eysturoy, Kristjan M. Joensen, vísir á, at endamálið við átakinum var serliga at fáa ferðandi í bili at brúka trygdarbelti, at ansa eftir, at bilar ikki koyra við píkum, nú tað ikki er loyvt, at førarar ikki eru ávirkaðir av rúsdrekka, og at bilførarar hava koyrikortið uppi á sær.

– Vit gjørdu eisini ferðmátingar, og vit kannaðu eftir, um akførini vóru í lógligum standi, sigur Kristjan M. Joensen.

Sýslumaðurin sigur, at tilsamans 442 akfør vórðu kannaði í tíðarskeiðinum, 6– 19. mai.

– Av 442 kannaðum bilum, skrivaðu vit 165 frágreiðingar fyri ymisk lógarbrot, sigur Kristjan M. Joensen.



# Anker Jørgensen í Sandoynni

**Sunnudagin var Anker Jørgensen á vitjan í Sandoynni**

*Jákup Lindenskov*

Tá Teistin kom til Skopunar, var Anker Jørgensen boðin vælkomin av Gerhardi Lognberg, løgtingsmanni og Jógvan Adolf Johannesen, fyrrverandi løgtingsmanni, og so varð farið inn á gólvið hjá Jógvan Adolfi, sum bjóðaði til vældúkað morgunmatarborð. Har gekk prátið av tí besta.

Síðani var í bussið farið eftir oynni, og sjálvur Jógvan Adolf hevði fult vald á mikrofonini og greiddi fróðliga frá øllum, sum var at síggja á ferðini, og tað var ikki smávegis, hann tók fram úr vitsku síni.

Koyrt varð til Sands, Skálavíkar og til Húsavíkar, steðgað varð av og á, m. a. framvið minnisvarðanum av Heðini Brú og oman fyri bátahylin í Húsavík.

Allastaðni har komið varð framvið vóru fólk, sum vildu hitta Anker Jørgensen, tey heilsaðu honum, stórtfingið at síggja, at fólk fegin vildu heilsa hesum fræga framherja í donskum politikki, og sum eisini hevur havt stóran gagnligan týdning fyri Føroyar.

Í Dali var hugnaligt døgurðaborðhald í Eiriksgarði. Farið varð upp á gólv eina løtu, og brot úr »Ved Kristiand« og »Brestiskvæði« vóru kvøðin hugaliga. Ikki sørt, at Anker Jørgensen gjørdist rættuliga álvuligur at vera uppi í ringinum.

Mánamorgunin fóru tey avstaðaftur við flogfarinum, strævin hevði ferðin verið, púra ovfarin var hann av móttøkuni, allastaðni, hann var, ikki minni var hann fegin aftur at vitja Norðurlandahúsið.



*Anker Jørgensen hyggur áhugaður at føroyska dansinum í Dali, sum hann so fegin vildi uppliva*
*Mynd: Oskar Oskarson*



*Anker Jørgensen uppi í dansinum…*
*Mynd: Oskar Oskarson*



*Anker Jørgensen og vinkonan, Vivy Niemand, v.m., til búgvið døgurðaborð í Eiriksgarði í Dali*
*Mynd: Oskar Oskarson*



*Heima hjá Jógvan Adolfi Johannesen í Skopun varð boðið til morgunmat*
*Mynd: Oskar Oskarson*



*Gerhard Lognberg, løgtingsmaður, Vivy og Anker Jørgensen lýða á Jógvan Adolf Johannesen*
*Mynd: Oskar Oskarson*